# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Seráhugamál – eisini við einum valdømi

Omanfyri hundrað fólk høvdu leitað sær oman í Miðlahúsið í gjárkvøldið at taka lut í orðaskiftinum um eitt valdømi.
Áskoðanirnar hesum viðvíkjandi komu væl og virðiliga til sjóndar, og stóð heldur ikki á hjá fólki at biðja um orðið og geva hugsan sína til kennar.
Hugaligt var at eygleiða, hvussu altráir politikararnir vóru eftir at greiða frá hugsjónum sínum hesum viðvíkjandi.
Einu løtuna tóktist, sum at tey, sum eru ímóti einum valdømi, tóku ræði av orðaskiftinum.
Men havandi í huga, at hesin bólkur eftir øllum at døma er í undirluta millum manna og tingfólk, so kunnu vit bert fegnast um, at tey her í Miðlahúsinum, ið sum kunnugt liggur í Suðurstreymi, fingu rúm fyri argumentum sínum.
"Rík og korrupt koma til ræði" – hetta var fleiri ferðir ført fram. At tað verða tey, sum hava pengar, netverk, útbúgving og útsjóndina til at tøla miðlarnar, sum verða vald í einum valdømi. Stríðið um atkvøðurnar fer í nógv størri mun fram í miðlunum, og sum frálíður missa fólk kring landið áhugan fyri at vera virkin í politikki, eisini í flokspolitikki. Tá er spurningurin, um ikki demokratiið hevur spælt fallit?
Eitt, sum fleiri ferðir varð flutt fram var, at við verandi skipan koma seráhugamál sum lokalpolitisk atlit fram um landspolitisk áhugamál. Og víst var til røðina av reiðarum og vinnulívsmonnum, sum sótu í løgtinginum og eygleiddu atkvøðugreiðsluna, tá eitt mál um fiskidagar varð viðgjørt. So seráhugamál fara altíð at verða í politiki, óansæð eitt ella fleiri valdømi.
Annað, sum borið var fram, var, at møguleikarnir hjá kvinnum at verða valdar, verða munandi betri í einum valdømi. Sagt varð, at við sjey valdømum eru flokkarnir næstan tryggjaðir ávísar sessir kring landið, og hesir sessir verða aloftast mannaðir av mannfólki, sum eru fyrstvaldir á listunum. At allar atkvøðurnar til kvinnur, sum í nógvur førum eru næst á listanum, fara fyri skeyti, sæst av, at 23 prosent av veljarunum lótu einari kvinnu atkvøðuna síðsta val, men bert níggju prosent av teimum valdu vóru kvinnur. Við einum valdømi høvdu hesi 23 prosentini komið kvinnunum til góðar.
Sum heild ein góður, siðiligur og til tíðir eisini stuttligur fundur, sum avgjørt legði botnin undir orðaskiftið, sum verður um eitt valdømi í Løgtinginum í dag, málið kemur til 1. viðgerð.

Sosialurin

## "What's in it for me?"

BERGTÓRA HØGNADÓTTIR JOENSEN



**Gangi í hesum døgum við óhuga í sinni. Var á fundinum týskvøldið um 'kvinnur og politikk'. Áhugavert og gott tiltak - allarmest fegnaðist eg um allar tær hollu og áhugaverdu kvinnurnar sum tóku orðið. Veldugt at lýða á! Eisini har var gott politikarapotentiali**

Aftur til óhugan. Harmist um, at vit allar siga "Líkist ongum", "Nú mugu qvinnurnar sleppa framat", "My oh my, tað hevði verið meiri dynamikkur, um fleiri kvinnur vóru á tingi", "Sæst týðiliga, at tað eru menn sum koma við uppskotunum!" Hetta siga vit ofta, men allar tær gløggu kvinnurnar eg tosi kvinnuumboðan við siga við ein munn, at tær ikki stilla upp. "Tað hevði eg ikki boðið mær sjálvari!", "Eg havi eitt gott arbeiðið sum er!", "Menninir dominera tað so til, at tað tími eg ikki!", "Vit sleppa jú ikki framat sum annað enn pynt á listunum!"

Vóni tí, at politisku flokkarnir allir sum ein fara at gera sítt til, ikki bara at fáa kvinnurnar á listan, men eisini at vera viðvirkandi til, at gera tað til eina góða uppliving, sum ger at uppaftur fleiri fara at hava hug til at vera við á politiska víðvøllinum.

Hvussu kundu politisku leiðslurnar gjørt tað hugaligt hjá kvinnum við børnum? Sum heild við at taka atlit til, hvussu kvinnan kann tvinna familju- og arbeiðslív.

Hvussu kann tað gerast?

- Fundast mest møguligt í vanligari arbeiðstíð
- Latið tær sloppið framat í útvarpi og sjónvarpi
- Skipa fyri barnaansing, tá floksting og aðrir longri fundir eru
- Tosa siðiligt við og um hvønn annan
- Avtala nær fundirnir byrja og enda

Tá arbeiðsgleðin í stóran mun hevur við góðar starvsfelagar og ávirkan á arbeiðsdagin at gera er týdningarmikið, at júst hetta eru eyðkenni í politiska lívinum.

Støðugt fleiri eru stakir uppihaldarir og nógvar eru sjómanskonur. Hesar kvinnur mugu hava ávirkan á arbeiðstíðirnir fyri at kunna vera við. Og bert við at hava eisini hesar kvinnur við, hava vit eitt løgting sum umboðar føroyska samfelagið.

Ímynda tær, hvussu nógv áhugaverdari tingvarpið hevði verið, um fleri kvinnur vóru á tingi! Og ímynda tær hvørji øðrvísi og mennandi uppskot, tá høvdu verið framd! Vænti mær, at vit høvdu sæð munagóðar ábøtur at kalla allastaðni í samfelagnum.

Hvat siga tit – skulu vit herja á allar?

## Loysingin av Idealstatinum Førjar anno 2015 og sovrit

JOHAN DALSGAARD



Eg var í viðgerð niðri í dk í ein mánað eftir at vera feilviðgjørdur fyri deppressión í Føroyum í uml 3 ár.
Sama dag sum eg frískur kom heim, fekk eg betendilsi undir einari plombu í einari tonn. Eg ringdi til tannlæknan, har eg greiddi einari ungari gentu (sum kanska tók telefonina aftan á skúlatíð?) um trupulleikan við kroniskari pínu, og tá hon hevði skilt akutta tørvin, gav hon mær eina tíð, har eg skuldi viðgerast um eina viku. Hon segði eisini, at eg skyldaði 600 kr, og eg segði, at eg skuldi hava pengarnar við, tá ið eg kom.
Tað er sjálvandi keðiligt at ganga við pínu eyka leingi, men eg havi prøvað verri, eri ein pionerur og gleddi meg eisini til at Føroyar verða heimsins beðsta land.
Í morgum, 2 tímar áðrenn eg skuldi til tannlækna, og 15 minuttir áðrenn dagliga panodil dosisin virkaði, ringdi hon aftur: Tíðin hjá mær var avlýst, tí hon sá knappliga at eg skyldaði pengar. Eg minti hana á, at pengarnir í lummanum hjá mær vóru klárir at hava við, sum avtalað. Tá segði hon, at eg beinanvegin skuldi fáa eina nýggja tíð, sum hon skuldi senda mær við postinum. Eg spurdi, um hon ikki heldur kundi ringja mær nýggju tíðina.
Eg haldi tað vera so býtt at brúka Snail Mail í landinum sum selur seg sum KT Heaven, alt meðan eg skuldi hava tannapínu, meðan eg bíðaði eftir postinum osv. Hettar skilti hon ikki, og samtalan endaði.
Skrivað stendur: ...og Jesus tókti hjartaliga synd í teimum..
Bíblian er borgarligt umsett, soleiðis at øll, sjálvt hvør gomul kona, skulu kunna lesa hana, uttan harvið at missa morgunmatarlistin og gleðina í tí dagliga. Ein slags sunnudagsskúlabaserað bók. Tað sum upprunaliga stóð, var meira ala: ...og tað sum Jesus sá, fekk hann at føla tað, sum um allur innvølurin á honum vendist við, og hann vildi illa spýggja. Tað er soleiðis eg havi tað, tá eg møti inkompetansu.
Ja, eg veit at man ikki kann lesa til at vera telefondama á Tannlæknastovuni, men man kann heldur ikki lesa seg til at vera nærlagdur og hava empati og entusiasmu.
Arbeiðsmangul og ALS ger, at øll skuldi kunna funnið sína hyll og so kundi, í hesum førinum, passandi verið settur upp ein telefonsvarari, meðan vit bíða seinastu 8 árini, inntil greinarnar vaksa inn í himmalin. Í løtuni eri eg har sum piparið grør.

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen
karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoygjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán. kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støddir:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.